LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

19. oktober 2024
Viðgjørt: MoH
Lógartænastan

9. útgáva

# Tilbúgvingarætlan

# Kunngering av almenna kunngerðablaði landsstýrisins

## (Vanlig hjálp, neyðstøður og neyðkunngering)

## 1.1 Innleiðing

Hetta skjalið snýr seg um tær mannagongdir, ið skulu verða fylgdar, um álvarsligir trupulleikar gera, at Kunngerðaskipanin hjá Lógartænastuni, ið liggur undir Løgmálaráðnum, ikki er virkin.

Skjalið lýsir mannagongdir, leiklutir og ábyrgdarøki hjá ávíkavist Lógartænastuni, KT Landsins og Elektron, tá netverkstrupulleikar, villur í sjálvari Kunngerðaskipanini o.tíl. hava við sær, at Kunngerðaportalurin ikki er tøkur hjá almenninginum, ella Kunngerðaskipanin ikki er tøk til kunngering.

Hetta skjalið lýsir ikki, hvussu omanfyri nevndu trupulleikar verða loystir tøkniliga.

## 1.2 Kunngerðaskipanin

Bæði Ríkisgrundlógin og Stýrisskipan Føroya hava ásetingar um, at tað er ábyrgd landsstýrisins at greiða rættarreglur til kunngeringar.

Í løgtingslóg um alment kunngerðablað er ásett, at landsstýrið stendur fyri rakstri av einum talgildum kunngerðablaði og ásetir nærri reglur hesum viðvíkjandi.

Í kunngerð um alment talgilt kunngerðablað verður ásett, at Løgmálaráðið stendur fyri rakstrinum, ritstjórnar og fyrisitur Kunngerðablaðnum og skipar fyri, at útgávan er atkomulig hjá almenninginum á heimasíðuni kunngerdaportalur.fo. Eisini er ásett, at útgávukervið til Kunngerðablaðið verður rikið og goymt á útbúnaðinum hjá tí, sum Løgmálaráðið hevur valt at hava ábyrgdina av rakstrinum av kervinum.

KT Landsins og Elektron eru vald at røkja omanfyri nevnda leiklut.

Um Kunngerðaskipanin ella Kunngerðaportalurin ikki eru virkin, kunnu rættarreglur ikki verða kunngjørdar, sum ásett í lóg, og almenningurin fær ikki kunnað seg um kunngjørda lóggávu. Tí hevur tað alstóran týdning, at skipanin er tøk og virkin, og at óvirknið verður avmarkað í mest møguligan mun.

## *1.3 Aktørar og brúkarar*

Tøkniliga umsitingin av skipanini og netverkinum verður røkt av starvsfólki hjá KT Landsins, Elektron og lutvíst av Løgmáleráðnum.

Umsitingarligi parturin av sjálvari skipanini, har lóggáva verður skrásett o.s.fr., verður røktur av útvaldum starvsfólki í Løgmálaráðnum og hjá Elektron.

Forendin av skipanini, Kunngerðarportalurin, verður brúktur og er tøkur hjá øllum, ið hava áhuga ella tørv á at gera seg kunnug við tað, ið kunngjørt er.

## *1.4 Veitarar*

Kunngerðaskipanin verður hýst á netverks- og servaraumhvørvi hjá Landsneti, og tøkniliga menningin av sjálvari skipanini liggur í stóran mun hjá Elektron.

## *1.5 Slóðir*

Slóðin til Kunngerðaportalin er hendan:
https://www.kunngerdaportalur.fo

Slóðin til umsitingarliga partin av kunngerðaskipanini er hendan:
https://admin.kunngerdaportalur.fo/

## *2.0 Tíðarskeið og atgeingi*

KT Landsins veitir trygd fyri einari nýtslutíð á 99%, grundað á eitt 30 daga samanhangandi tíðarskeið - hetta sambært Fak SLA, ið er gjørdur millum KT Landsins og Løgmálaráðið.

## *3.0 Vanlig hjálp*

### Vanlig hjálp – KT Landsins

Vanlig hjálp, ið ikki hevur bráskund, fer fram umvegis Helpdesk skipanina til ber eisini at fáa samband við KT Landsins umvegis teldupost, telefon, annan hóskandi miðil ella sum lýst í aðrari avtalu.

### Vanlig hjálp - Elektron

Vanlig hjálp, ið ikki hevur bráðskund, fer fram umvegis HelpDesk hjá Elektron við at senda teldupost til sd@elektron.fo ella við at ringja á telefon 34 52 00.

## Vanlig hjálp - trupulleikar á brúkarastøði

Mannagongdir, tá ið trupulleikar stinga seg upp. Brúkarin merkir her starvsfólk í Løgmálaráðnum, ið hava rættindi at arbeiða við umsitingarliga partinum av kunngerðaskipanini.

1) Brúkarin hevur teldutrupulleikar
   - Brúkarin skal seta seg í samband við KT Landsins

2) Brúkarin fær ikki samband við teldukervið hjá Landsnet
   - Brúkarin skal seta seg í samband við KT Landsins

3) Brúkarin fær ikki samband við internetið
   - Brúkarin skal seta seg í samband við KT Landsins

4) Brúkarin fær ikki Direct Access at virka
   - Brúkarin skal seta seg í samband við KT Landsins

5) Brúkarin fær ikki samband við Kunngerðarskipanina
   - Brúkarin skal í fyrsta lagi seta seg í samband við KT Landsins
   - Um tað vísir seg, at tað snýr seg um trupulleikar við sjálvari skipanini, setir KT Landsins ella Løgmálaráðið seg í samband við Elektron, so loysn fæst á trupulleikunum í samráð við teir

6) Brúkarin fær ikki lagt inn ella givið rættarreglur út, tí trupulleikar eru við sjálvari kunngerðaskipanini
   - Brúkarin skal seta seg í samband við Elektron

## *4.0 Neyðstøður*

Neyðstøða er fráboðað støða, har Kunngerðarskipanin ella Kunngerðarportalurin ikki eru virkin.

## Átaksleiðsla fyri neyðstøður

Hesi fólk manna átaksleiðsluna fyri neyðstøður, og skulu antin hittast ella samskifta umvegis hóskandi miðil um loysn á trupulleikum, tá neyðstøða er sett í verk:

Fólkið í Løgmálaráðnum, sum er raðfest í talvu 1
Fólkið í KT Landsins, ið er raðfest sum nr. 2 og 3 í talvu 1
Fólkið á Elektron, sum er raðfest í talvu 1

## Íverksetan av neyðstøðu

Neyðstøða kann einans verða lýst og avlýst av fólki í Løgmálaráðnum, sum raðfest í talvu 1.

Neyðstøða verður vanliga lýst, um niðanfyristandandi støður taka seg upp:

-Tá ein av neyðstøðunum í hesum skjali kemur fyri, ella annað vandamál, ið ikki er tikið við her, tekur seg upp.

- Tá ein ikki við vissu kann siga, nær vandastøðan væntandi er av, ella tað við vissu kann staðfestast at vandastøðan stendur við í eitt tíðarbil, har tørvur er á kunngering, ella har tað er væntandi, at tørvur verður á kunngering.

## Fráboðan um neyðstøðu

Tá KT Landsins ella Elektron renna seg í ein trupulleika, ið verður mettur at kunna hava neyðstøðu við sær, skal stovnurin venda sær til Løgmálaráðið, sum raðfest í talvu 1. Um samband ikki fæst við rætta viðkomandi innan rímuligt tíðarbil – t.e. uml. 30 min., og um støðan er átrokandi, verður roynt at fáa samband við næst raðfesta fólkið á listanum.

Tá Løgmálaráðið rennir seg í ein trupulleika, ið verður mettur at kunna hava neyðstøðu við sær, skal stovnurin venda sær til KT Landsins og/ella Elektron, sum raðfest í talvu 1. Um samband ikki fæst við rætta viðkomandi innan rímuligt tíðarbil – t.e. uml. 30 min., og um støðan er átrokandi, verður roynt at fáa samband við næst raðfesta fólkið á listanum.

***Talva 1***

| ***Rað-festing*** | ***Løgmálaráðið*** | ***KT Landsins*** | ***Elektron*** |
|---|---|---|---|
| 1 | Navn: Mortan Hentze<br>Arbeiðsøki: Lógasavns-mennari<br>Telf. nr.: 55 80 71<br>T-postur: mortanh@lmr.fo | Navn: KT Skivan<br>Arbeiðsøki: Support og vaktskipan á Landsneti<br>Telf. nr.: 35 24 90<br>T-postur: ktskivan@gjaldstovan.fo | Navn: Tim Wentzlau<br>Arbeiðsøki: Mennari/System Developer<br>Telf. nr.: 29 51 44<br>T-postur: tim@elektron.fo |
| 2 | Navn: Guðrið D. Andreassen<br>Arbeiðsøki: Journalleiðari<br>Telf. nr.: 55 80 93<br>T-postur: gudrida@lmr.fo | Navn: Birgir av Steinum<br>Arbeiðsøki: Deildarstjóri á Landsneti<br>Telf. nr.: 79 24 99<br>T-postur: birgir@gjaldstovan.fo | Navn: Bartal Henriksen<br>Arbeiðsøki: Mennari<br>Tlf. nr.: 29 51 41<br>T-postur: bartal@elektron.fo |
| 3 | Navn: Nella Festirstein<br>Arbeiðsøki: Aðalstjóri<br>Telf. nr.: 55 80 76<br>T-postur: nellaf@lmr.fo | Navn: Leif Abrahamsen<br>Arbeiðsøki: Stjóri á Gjaldstovuni<br>Telf. nr.: 21 46 60<br>T-postur: leif@gjaldstovan.fo | Navn: Hanus Reinert<br>Arbeiðsøki: Mennari<br>Tlf. nr.: 29 51 65<br>T-postur: hanusr@elektron.fo |
| 4 | | | Navn: Hans Petur Weihe<br>Arbeiðsøki: Menningar-leiðari<br>Tlf. nr.: 29 51 07<br>T-postur: hansp@elektron.fo |

## Mannagongdin fyri afturmelding, tá neyðstøða er sett í verk

Stovnur, sum hevur loysn á trupulleikanum um hendi, boðar Løgmálaráðnum frá í seinasta lagi 1 tíma eftir, at neyðstøðan er fráboðað, ella skjótast til ber, nær trupulleikin verður ella væntandi verður loystur.

Um trupulleikin verður loystur beinanvegin, skal verða boðað Løgmálaráðnum frá hesum, uttan drál, so skjótt hetta er framt.

Um stovnur flytir loysn á trupulleika til annan stovn, skal tann stovnurin, ið flytir trupulleikan til annan stovn, boða Løgmálaráðnum frá hesum, uttan drál, so skjótt hetta er framt.

## At føra logg

Løgmálaráðið skal føra neyðstøðulogg. Skjalfestast skal, hvør trupulleikin er, ið hevur ført til neyðstøðu, hvør hevur lýst neyðstøðuna og avlýst hana, og hvat er gjørt av hvørjum og nær.

## Innlating av rættarreglum til kunngeringar í sambandi við neyðstøðu

Í neyðstøðu verður einans óvanliga átrokandi kunngering framd. Løgmálaráðið setur seg í samband við hini stjórnarráðini fyri at boða frá, at neyðstøða er sett í verk, og fyri at fáa greiðu á, um tørvur verður fyri neyðkunngering og nær. Tilfar til kunngeringar skal latast Løgmálaráðnum eftir vanligum mannagongdum um til ber. T.e. at undirskrivað frumrit í pappírsformi og elektronisk wordfíla við tí, ið skal kunngerast verða latin Løgmálaráðnum.

## *5.0 Endurskoðan av tilbúgvingarætlanini*

Hendan tilbúgvingarætlanin verður endurskoðað á hvørjum ári.

## *6.0 NEYÐSTØÐA 1*
## *Kunngerðaskipanin gerst óvirkin*

## Ætlan

Í fyrsta lagi skal Elektron meta um trupulleikan, t.e., um hann kann bøtast ella um endurútgáva er neyðug, t.e. eitt nú at innlesa trygdaravrit. Um væntandi er, at kunngerðaportalurin, ið vendir sær móti almenninginum, fer at liggja lamin í fleiri enn 24 tímar verður hetta kunngjørt í fjølmiðlunum.

Rættarreglurnar, ið skulu kunngerast, verða kunngjørdar á einari neyðsíðu - uttan um kunngerðaskipanina um neyðugt. Um gjørligt, verður heimasíðan hjá Løgmálaráðnum brúkt til hetta endamálið. Um hon ikki er tøk, verður onnur síða, ið er tøk og virkin, brúkt til endamálið.

Elektron skipar fyri, at ein redirect verður gjørdur frá Kunngerðaportalinum til neyðsíðuna, um hetta letur seg gera.

Um kunngjørt verður, so sum neyðstøða 1 fyriskrivar, verða skriv ella boð send fjølmiðlunum, har greitt verður frá, á hvørjari internet adressu neyðkunngjørdar rættarreglur eru at finna, og at ein kann venda sær til Løgmálaráðið um ein hevur tørv á at kunna seg um áður kunngjørdar rættarreglur.

Lýst verður eisini í fjølmiðlunum, tá trupulleikin er fingin í rættlag aftur.

Um okkurt er kunngjørt á neyðsíðu verður hetta endurkunngjørt sum umprent í Kunngerða-skipanini, tá hon gerst virkin aftur.

### Aktørar

Løgmálaráðið, Elektron og KT Landsins.

## *6.1 NEYÐSTØÐA 2*
## *Løgmálaráðið hevur einki netsamband við servaran hjá Landsneti, har Kunngerðaskipanin verður hýst*

### Ætlan

Landsnet tryggjar starvsfólki í Løgmálaráðnum atgongd til Kunngerðaskipanina og servaran, antin á hóskandi staði ella beinleiðis á staðnum, har Kunngerðaskipanin verður hýst.

### Aktørar

Løgmálaráðið og KT Landsins.

## *6.2 NEYÐSTØÐA 3*
## *Servarin hjá Landsneti, har Kunngerðaskipanin liggur, hevur einki samband við internetið*

### Ætlan

Um væntandi er, at kunngerðaportlurin, ið vendir sær móti almenninginum, fer at liggja lamin í fleiri enn 24 tímar verður hetta kunngjørt í fjølmiðlunum.

Rættarreglurnar, ið skulu kunngerast verða kunngjørdar á einari neyðsíðu - uttan um kunngerðaskipanina um neyðugt. Um gjørligt, verður heimasíðan hjá Løgmálaráðnum brúkt til hetta endamálið, um ikki verður onnur síða, ið er tøk og virkin, brúkt til endamálið.

Elektron skipar fyri, at ein redirect verður gjørdur frá Kunngerðaportalinum til neyðsíðuna, um hetta letur seg gera.

Um kunngjørt verður, so sum neyðstøða 3 fyriskrivar, verða skriv ella boð send fjølmiðlunum, har greitt verður frá, á hvørjari internet adressu neyðkunngjørdar rættarreglur eru at finna, og at ein kann venda sær til Løgmálaráðið um ein hevur tørv á at kunna seg um áður kunngjørdar rættarreglur.

Lýst verður eisini í fjølmiðlunum, tá trupulleikin er komin í rættlag aftur.

Um okkurt er kunngjørt á neyðsíðu, verður hetta endurkunngjørt sum umprent í Kunngerðar-skipanini, tá hon gerst virkin aftur.

## Aktørar

Løgmálaráðið, KT Landsins og Elektron.

## *6.3 NEYÐSTØÐA 4*
## *Internetið liggur lamið kring alt landið*

## Ætlan

Í slíkari neyðsynjarstøðu ger landsstýrismaðurin í lógarmálum av, hvussu kunngerast skal.

Møguligar loysnir:
Kunngjørt verður umvegis útvarp, sjónvarp ella annan fjølmiðil. Um rættarreglan er ov umfatandi til at verða lisin upp í útvarpi og sjónvarpi, verða einans heitið, dagfestingin og nr. á kunngjørdu rættarregluni lisin upp, og upplýst verður, hvar borgarin kann kunna seg um innihaldið í kunngjørdu rættarregluni.
Kunngjørda rættarreglan kann verða sligin upp á almennum støðum kring landið.
Kunngjørda rættarreglan kann verða lisin upp á almennum støðum kring landið.

## Aktørar

Landsstýrismaðurini lógarmálum.

Løgmálaráðið, 16. oktober 2024

**Nella Festirstein (sign.)**
aðalstjori